# HEILSANIR




**Góði Pauli**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum, sum er í dag. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan babba, mamma og stórasystir**



**Halló, smily!**
Tillukku við degnum 9. nov. Nú fari eg í hvussu so er at halda meg av vegnum, he he! Tvætl! Nú fara vit bara at liggja á vegnum!
**Kærar heilsanir meee...**



**Góða Marita**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Jesus pápi veri hjá tær í framtíðini. Her ert tú lítil og fitt, nú ert tú bara fitt.
**Kærar heilsanir omman og abbin á Sandi**



**Góði Juleif gubbi**
Her svevur tú væl við mínum pútum, nú mást tú vakna. Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum mánadagin ynskir
**Jutta**



**Góða Guðrið**
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum í dag. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Heilsan mamma, Kim og lítlibeiggi**



**Góða Maria**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum tann 10. nov.
**Bestu heilsanir mamma og babba**



**Hey, Elna!**
Tillukku við 18 ára degnum. Nú ert tú endiliga 18! Her høvdu vit tað gott … ááá, tað vóru tíðir! Takk fyri eitt gott kappingarár!
**Heilsan manningin!!!**



**Góðu abbi og ommalang**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 10. og 11. nov. Takk fyri at tit eru so góð við meg.
**Heilsan Andrew**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum ynskja vit í húsorkestrinum.
**Heilsan Irena og Regin**



**Hey Trutlungi!**
Tillukku við 18 ára degnum 9. nov. Nú fara vit biltúr. Her ert tú lítil og fitt, nú ert tú bara fitt!
**Kærar heilsanir gita nú!!!**



**Góða, fitta Silja**
Hjartaliga tillukku á tínum 3 ára føðingardegi, sum er 11. nov. Her ert tú ein svansibobb. Jesus pápi signi lívsleið tína. Tey allarbestu ynski frá okkum her norðuri.
**Abbi og omma**



**Góðu Turid og Heini**
Hjartaliga tillukku við døgunum 9. og 10 novemb-er ynskja
**omma og abbi**



**Góðu Turid og Heini**
Tillukku við 7 og 2 ára døgunum 9. og 10. november. Alt tað besta framyvir ynskja
**mamma og babba**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# FØÐINGAR



1. november fingu Adrian og Jónatan ein lítlan beiggja sum eitur Ísak, hann var 59 cm. og vigaði 4280 gr. Foreldrini eru Carol og Poul Joensen, North Cotes í Englandi

26. oktober fingu Lis og Sjúrður Sivertsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4120 gr.

28. okt. fingu Súsanna við Streym og Jesper Thomsen, Esbjerg, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3150 gr.

30. oktober fingu Selma og Petur Larsen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3250 gr.

2. november fingu Thora Petersen og Búi Holm, Bøur, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4450 gr.

2. november fingu Sólvá á Rógvi Joensen og John Joensen, Vestmanna, ein son. Hann var 57 cm.og vigaði 4000 gr.

2. november fingu Annette Sørensen og Hans Jákup Ellingsgaard, Saltangará, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 2875 gr.

3. november fingu Annika og Regin Gregersen, Søldarfjørður, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 3300 gr.

4. november fingu Halldóra Haasen og Signar Persson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3000 gr.

4. november fingu Ann Thomsen og Petur Martin Johansen, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm. og vigaði 3250 gr.

4. november fingu Palma Olsen og Christian Høgni Jacobsen, ein son. Hann var 54 cm.og vigaði 4530 gr.

5. nov. fingu Óluva í Gong og Erling Egholm, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 44 cm. og vigaði 1775 gr.

5. november fingu Sanna og Poul Juul Festirstein, Eiði, ein son. hann var 53 cm. og vigaði 3650 gr.

# ANDLÁT

**6. oktober**
Sigrun Sølva Vesturskarð, fødd Rasmussen, Tórshavn, 62 ár

# PRÓGV

5. okt. fekk Jónrit Nielsen, av Strondum, prógv sum skrivstovukvinna innan fyrisiting. Lærupláss: P/F Havnar Timburhandil.

22. okt. fekk Jóna Sólbjørg Nielsen, av Strondum, prógv sum Sosial og sundhedsasssistent. Lærupláss: Sosial og Sundhedsskolen, Odense.

# TILTØK

**Gudstænastur**
**24. sunnud. e. trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12, Bergur D. Joensen, Útvarp Føroya
*Kollafjørður:* kl. 12, Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 12, Povl Bendix Knudsen
*Hellurnar:* kl. 12, altarg., Uni Næs
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Æðuvík:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Hvalvík:* kl. 12, Petur Martin Rasmussen
*Søldarfjørður:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Glyvrar:* kl. 11 lestur, kl. 15 Barna- og familjugudstænasta, barnakór syngur
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa
*Norðskála:* kl. 15, Barnagudstænasta, Emil Olsen
*Skálavík:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Sumba:* kl. 12, altarg.,
*Vágur:* kl. 17, allahalganna konsert við Ljómi, gudstænasta við altarg. Marianne Telling
*Hov:* kl. 11, altarg.,
*Sandvík:* kl. 13, Ólavur Rasmussen.
*Miðvágur:* kl. 11, Inga Poulsen Dam

*Porkeris kirkja:* Sunnudagin gongur talvan fyri einkjugrunnin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
**Vikuskiftismøti í Hoyvíkar skúla**
Í kvøld kl. 20.00 Møti v/ Fimmboga Poulsen, Bjarta Olsen syngur. Kl. 22.00 Lovsangs- og sangmøti, luttøka við millum øðrum Dánjal og Hjørdis Petersen, Magna Christiansen, lovsangsbólkinum í Hoyvík, Tór Ingar Akselsen og fleiri.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ Kajberg Davidsen, Jona og Marita syngja.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Vónin – ein eggjan til missión. Kl. 11.00 Gudstænasta, Børge Schantz.
Sunnukvøldið kl. 19.30 byrjar Børge Schantz fyrilestrarrøð á Parnassinum um Islam. Fyrsti fyrilestur verður um søgu Islams og útbreiðslu.

**Sjómanskvinnuringurin**
í Havn kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið kl. 19.30. Sjómanskvinnuringurin á Argjum verður við.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Samfelagsmøtini halda áfram.
**Í Ítróttarhøllini á Hálsi:**
Leygardagin kl. 16.00 Uppbyggingarmøti, kl. 20.00 Evangel. møti, við deyvatulking, kl. 22.30 Opið hús.
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.15 Barnamøti, kl. 16.00 Uppbyggingarmøti, við deyvatulking.
**Náttturði verður í høllini beint aftaná møti.**
Sunnukvøldið kl. 19.00 Evangel. møti, við deyvatulking.
**Møti sunnukvøldið verður sent beinleiðis í Útvarp Føroya.**
Mánakvøldið kl. 20.00 Møti.
Týskvøldið kl. 20.00 Møti.
Heimasíðan:
www.ebenezer.fo

**Hebron, Argir**
Einki møti komandi sunnudag vegna samfelagsstevnuna í Ebenezer. Heimasíða www.hebron.fo

**Rhema á Hálsi**
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 og 18.00 Møti. Sunnudagsskúli kl. 14.00. Bøn kl. 17.30.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Absalon Matras, Manskórið syngur.
**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Oðrsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Hóskvøldið 7. nov. kl. 20.00 verður Taizé-kvøldið (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16 í Kerit. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og juniormøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00 Landsbøn, kl. 20.00 Grøðingarmøti.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Bergur Skovgaard, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin v/ Bergur Skovgaard.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara:
www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Kjartan Mørkøre presti. Evni: Eitt sindur um Luther.
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19.00 Møti við luttøku av Glyvrum.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánadagin kl. 20.00 Húsmøti hjá Kristin og Gyndu.
Telefonandaktin 424741.

**Norðskála kirkja**
Kirkju- og missiónsvikan heldur fram í dag og í kvøld. Kl. 17.00 Barnamøti við Leilu Højgaard, Toftir, kl. 19.30 Bíbliutími: Lukasar evangeliið, kl. 20.00 Møti við Hera Tróndheim, Argir.
Í morgin 24. sunnudag e. trinit. – kl. 12.00 Lestur, kl. 15.00 Barnagudstænasta, kl. 18.30 Bíbliutími: Jóhannesar evangel., kl. 19.00 Møti við Bjarni Bæk, dómprósti.

**Norðskála**
Mánadagin kl. 20.00 Katekismusgudstænasta, Emil Olsen.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20.00, Kristian Martin Petersen verður við. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen.
Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20.00.

**Bønhúsið á Hellunum**
Í kvøld kl. 20.00 talar Regin Høgnesen og menn av Strondum syngja.
Sunnukvøldið kl. 18.00 talar Niels Jacob Nielsen, innsavnan verður til Heimamissiónina.

**Tjørnuvík**
Møti verður í bygdarhúsinum í kvøld kl. 20.00, Niels Jacob Nielsen talar. Manskórið í Meinigheitshúsinum syngur.
Sunnudagin kl. 15.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti Regin Høgnesen talar, Jóhanna, Halgerð og Marita syngja.

**Keldan, Skálafirði**
Leygardagin kl. 17.30-19.30 Juniorarbeiði fyri børn 3.-7. fl. Kl. 21.00 Opið hús.
Sunnumorgunin kl. 11, Møti við Jan Jacobsen, barnamøti kl. 11.00. Sunnukvøldið kl. 19.00 Evangeliskt møti.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúlin fer til Leirvíkar í sunnudagsskúla í morgin. Koyrt verður frá Thabor kl. 14.00. Møti er í Thabor kl. 18.00, Ungdómsmøti kl. 21.00.

**Sjómanskvinnuringurin**
í Runavík kemur saman á Sjómansheiminum til hugnaløtu. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar. Mint verður á jólapakkarnar.

**Elim Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12.00 Breyðbróting. Sunnudagsskúlin og evangeliska møti eru avlýst vegna samfelagsmøti í Tórshavn.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti við Bergur Skovgaard.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna missiónsvikuna í Skálavík.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 talar Johan Henriksen, Klaksvík, felagskórið úr oynni syngur.
Leygarkvøldið kl. 20.00 talar Johan Henrikan, Trio av Sandi syngur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 19.00 talar Alfred Olsen, Saltnes, manskórið syngur, innsavnan til húsið leygar- og sunnukvøldið. Drekkamuður bæði kvøldini.

**Soli Deo Gloria**
Susanne og Leif Madsen, missiónspar úr Kenya tosa á møtinum leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.
Mánadagin kl. 20.00 Alphaskeið/Bønarmøti.
Øll eru vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
*á Brekku 19*
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Leygardagin kl. 19.30 Møti v/ Alfred Petersen, Gospelkórið Gleði syngur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Klæmint Tausen, Tórhild Bjarkhamar syngur. kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**KFS luttekur í innandurakapping**
á Giljanesi leygardagin 9. nov. Danski KFS-skrivarin og 2 næmingar frá LTC hava bíbliutímar. Evnini verða: »Korset - et tegn på hvad?« og »Hvad betyder kristendommen/Jesus for mig?«. Øll eru vælkomin til bíbliutímarnar. Matur fæst til keyps.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Johan Thomasen. Bønarmøti verður hálvan tímá áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti við Sigrid Ludvig og Dennu. Terji Nielsen og Mourits Viderø syngja og spæla.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið.

**Føroyahúsið**
**Sunnudagin 10. nov.** kl. 17.00 verður evangeliskt møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn. Andrew Berghamar kemur at tala. Á skránni verður eisini felagssangur, sangframførsla og annað. Aftaná verður ókeypis drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.